# Til



*Øssur Winthereig (49) við soninum Jens, sum verður 1 ár í komandi viku*

**Tað er altíð ein stór uppliving at fáa eitt barn. Men tað er ein sonn kollvelting at gerast pápi, tá man nærkast teimum fimmti. Hetta var niðurstøðan hjá tíggju gomlum pápum, sum vit bjóðaðu til brunch og pápaprát ein gulan sunnudag í apríl – við børnum sjálvandi**

Hvussu kennist tað at blíva pápi, tá ein kundi sitið í einum djúpum lenistóli við ternutum inniskóm og nærlisið heimsatlasið?

Tíggju pápar tóku beinanvegin av einari innbjóðing til brunch á Hvonn ein vakran sunnumorgun til eitt prát um, hvussu tað er at fáa barn, tá ein er eldri enn føroyski miðalpápin.

Tí eru 13 elskulig børn millum null og fimm ár farin í býin við pápunum í dag – í kjólum, frakkum, skjúrtum og onkur við bamsu undir arminum. Tey tykjast serstakliga væl nøgd at vera einsamøll við so nógvum glaðum vaksnum monnum í senn – heilt vist eisini ein sera sjáldsom hending í einum barnalívi anno 2008. Bara smíl og "fitti babba", onki grenj ella plágarí – og bara ein einkult kukkublæa í nærum tríggjar tímar.

Hópurin leggur fyri við at fáa sær av leskiliga sjálvtøkuborðinum, og sjálvandi er øll seancan merkt av kulum kaosi, tí børnini eru smá og vandarnir nógvir, við heitum íløtum og bróttum trappum. Undirritaða heldur tí eitt vakið eygað við tvey ára gomlu tvíburunum Elisabet og Sofíu, meðan pápin, Rasmus Magnussen (48), fær teimum mat upp á tallerkin. Tá eg ringdi til hansara og bjóðaði honum og diddunum til brunch, ivaðist hann eina løtu, tí, sum hann segði: Tað fer ongantíð at ganga - tær eru ongantíð í friði. Men hann var kortini lættur at yvirtala.

Skjótt eru tallerkarnir rokaðir við feitum enskum breakfasti, ella mannfólkamati. Bara ein hevur fingið sær eitt pinkalítið sindur av grønum úr leskiligu salatbarrini eisini. Men soleiðis skal tað vera: Egg og bacon, reyðir búffar við sós, smáar pylsur og kaffi og djús í stríðum streymum. Og pitsapetti til børnini.

## Hvør aldur sína sjarmu

Vit sessast, og í stilla sinni mínum hugsi eg, at tann sum skírdi bindiklubbar høsnagarðar at vera, hóskandi kundi uppfunnið eitt líknandi heiti til gorrandi pápabólkin. Vit koma víða um, og niðurstøðan er, at hvør aldur hevur sína sjarmu, og sjálvandi hevur tað bæði sínar fyrimunir og vansar at gerast pápi, tá ið ein er so gamal. Fleiri av monnunum siga, at kropsliga er orkan ikki tann sama longur, men mentalt eru teir klókari, búnari og tolnari. Eisini er hugurin at ganga í býnum minkaður við árunum. Onkur viðgongur, at tað er rættiliga strævið við smábørnum, og at fjúsið er væl styttri nú enn fyrr. Ein fyrimunur er tað at vera væl etableraður í sambandi við bústað og arbeiði. Men millum teirra, sum hava upplivað at fáa ein eftirnølara og sum hava eldri systkin í húsinum, er semja um, at systkini eru ótrúliga góð at hava. Allir páparnir eru virknir á arbeiðsmarknaðinum og eiga fleiri børn - summir hava havt somu konu øll árini, meðan aðrir hava fleiri forhold í ryggsekkinum. So hvørt sum prátið gongur, gerst greitt, at nógvir hava ymiskt í felag, men tað hoyra vit um seinni.

## Eitt undurbarn

Í øðrum horninum sita tveir kendir klaksvíkingar.

- Eg og konan eiga trý børn: Tað fyrsta var eitt kærleiksbarn, tað næsta eitt ynskibarn og eftirnølarin eitt undurbarn.

Sosialurin